# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*-Eg havi sagt Shimon Peres, at eg ætli mær at skjóta hann upp sum forseta í Ísrael (Ehud Olmert, forsætisráðharri).*

# Russar til reiðar at útflýggja KGB-mann í býti við ríkmann



*Andrej Lugovoj heldur uppá, at hann ikki myrdi Alexander Litvinenko.*



*Ríkmaðurin Boris Berezovsky og Vladimir Putin, forseti, sita ikki væl um sátt.*

**Russland er sinnað at útflýggja KGB-mannin, sum sambært bretum myrdi Alexander Litvinenko, men ikki treytaleyst.**

Í gjár fingu russisku myndugleikarnir eina formliga áheitan frá bretska sendiharranum í Moskva um at útflýggja fyrrverandi KGB-yvirmannin Andrej Lugovoj, sum sambært bretska ákæruvaldinum var við til at myrða ein annan fyrrverandi KGB-mann, Alexander Litvinenko, í London í november í fjør.

Eygleiðarar í Moskva hava langt síðani sagt, at Russland fór ongantíð at útflýggja ein av sínum borgarum til rættarsókn uttanlands, tí russisk lóg forðar tí. Men málið fekk eina óvæntaða vend í gjár, tá formaðurin í russisku trygdarnevndini, Vladimir Vasilyev, mælti Bretlandi til at útflýggja russiska ríkmannin Boris Berezovsky í býti við Andrej Lugovoj.

Boris Berezovsky hevur búð í London, eftir at hann flýddi úr Russlandi fyri sjey árum síðani. Russisku myndugleikarnir siga, at teir vilja hava hann fyri rætt-in fyri ymisk lógarbrot, men sjálvur sigur Berezovsky, at talan er um politisk tiltøk ímóti sær, og at tað er Vladimir Putin, forseti, sum stendur aftanfyri.

Bretska uttanríkisráðið segði í gjárkvøldið, at landið fer ikki at ganga við til nakað býti, og at myndugleikarnir framvegis krevja at fáa Andrej Lugovoj útflýggjaðan. Hinvegin hava bretar váttað, at Alexander Litvinenko hitti Boris Berezovsky fleiri ferðir í London.

## Ósekur

Andrej Lugovoj heldur uppá, at hann er ósekur. Hann segði við russiskt sjónvarp sunnudagin, at hann hevði tosað í telefon við Litvinenko, eftir at hesin var komin á sjúkrahús.

-Eg tosaði bæði við hann og konu hansara, og hvørki teirra segði eitt ilt orð við meg. Tær bretsku ákærurnar ímóti mær hava politiskan dám, og eg skal lova tykkum, at eg fari at koma við skakandi avdúkingum um stutta tíð, segði Andrej Lugovoj við russiska sjónvarpið fyrradagin.

# Illveður á hvítusunnu

**Minst 14 fólk doyðu í illveðri í Evropa um halguna.**

Lýggj og slavin luft yvir Eystur- og Miðevropa og kølin luft í Vestur- og Norðurevropa fingu torusláttur, grimdarregn, hegling og storm at órógva hvítusunnuhalguna nógvastaðni.

Frá útsynningspartinum av Fraklandi til Sveis og landnyrðingspartin av Týsklandi regnaði illa, og okkurt ælið við heglingi var eisini. Harafturat slóð toran niður fleiri ferðir, og harðar hvirlur gjørdu stóran skaða. Veðurmenninir siga, at í teimum sveisisku Alpunum var avfallið 130 millimetrar um hvítusunnuna, og tað er óvanliga nógv hesa ársins tíð.

Sambært myndugleikunum í teimum ymsu londunum kravdi illveðrið minst 14 mannalív. Í Týsklandi doyðu tríggir handverkarar, tá toran slóð niður, og í Fraklandi druknaðu trý fólk uttan fyri Bretagne-strondina. Í Grikkalandi druknaðu seks fólk, tá ein á fór upp um árbakkarnar. Eisini í Bosnia kravdi illveðrið mannalív.

## STUTT SAGT

### Ivi um skammbyrsu

Enn dugir svenska løgreglan ikki at siga, um ein skammbyrsa, sum bleiv funnin í einum vatni í Miðsvøríki, bleiv brúkt, tá Olof Palme, forsætisráðharri, bleiv myrdur í 1986. Skammbyrsan bleiv funnin í november í fjør, men hóast hon er gjølla kannað, er løgreglan ikki komin til nakra niðurstøðu enn, skriva svensk bløð. Stefan Pettersson, sum er vápnaserfrøðingur hjá kriminalløgregluni, segði í gjár, at tann trupulleikin er, at skammbyrsan er so illa rustað. Tað var blaðið Expressen, sum fekk at vita um skammbyrsuna í vatninum, og blaðið fekk tveir kavarar at leita. Teir funnu byrsuna og lótu løgregluni hana.

### Mótmæla Chavez

Í Venesuela eru fólk í øðini, tí myndugleikarnir sýta fyri at leingja sendiloyvið hjá teirri væl umtóktu sjónvarpsstøðini RCTV. Stjórin á støðini, Marcel Granier, segði í gjár, at venesuelski forsetin, Hugo Chavez, er vorðin óður í høvdinum, og at hann vil hava landið skipað sum eitt samfelag, har hann stýrir einsamallur. Meiningakanningar í Venesuela hava víst, at millum 70 og 80 prosent av fólkinum vilja hava RCTV at halda fram. Í fjør setti støðin seg upp ímóti forsetanum og politikki hansara, og tað hóvaði ikki forsetanum, sum fær frið í tí almenna sjónvarpinum, skrivar Reuters.

### Breti fallin

Bretska verjumálaráðið váttaði í gjár, at ein bretskur hermaður doyði í einum samanbresti í Afghanistan á hvítusunnu. Hermaðurin var í einari deild, sum hevur støð í tí ófriðarliga Helmand-landspartinum har suðuri í landinum. Bretland hevur 6.000 hermenn í Afghanistan, og 57 bretskir hermenn hava latið lív har síðani innrásina í landið í november í 2001. Bretska stjórnin ætlar at økja hermannatalið upp í 7.700 seinni í ár.